Kommunufelagið

Mentamálaráðið
Hoyvíksvegur 72
Postrúm 3279
110 Tórshavn

Dagfesting
23. januar 2019

Okkara j.nr.
19/0001328

Málsviðgeri
Jóhan Lamhauge

Tygara j.nr.

**Viðv. uppskoti til broytingar í fólkaskúlalógini**

Kommunufelagið skal hervið koma við viðmerkingum til fyriliggjandi uppskot, ið er sent felagnum til hoyringar.

Kommunurnar hava havt høvi at koma við viðmerkingum til uppskotið, eins og uppskotið er viðgjørt í Stýrinum og í Mentanarnetverkinum hjá Kommunufelagnum.

Í fylgiskrivinum til lógaruppskotið verður sagt, at "*Kunnað verður um, at løgtingslógaruppskotið er úrslit av tvørpolitiskum arbeiði og aðalorðaskifti í Løgtinginum á heysti 2018, har ymisk øki í fólkaskúlaskipanini eru viðgjørd m.a. 10. flokkur, samfelagsfrøði sum kravd lærugrein, kravda undirvísingartímatalið í hvørjum árgangi og skúlabygnaður við atliti at skúlaøkjum og skúlasamstarvi millum kommunur.*" Hetta sama sæst eisini í sjálvum uppskotinum. Ógreitt er, hvat ítøkiliga liggur í orðingini "tvørpolitiskum arbeiði", men Kommunufelagið undrast á, at slík viðurskifti í fólkaskúlalógini, sum samstarv um 10. flokkar og skúlabygnaður við atliti at skúlaøkjum og skúlasamstarvi millum kommunur yvirhøvur, verður viðgjørt, uttan at kommunurnar, umvegis Kommunufelagið og fakligu skúlaførleikarnar innan kommunala geiran, hava ein aktivan leiklut í fyrireikandi arbeiðinum til broytingar í lógini.

Ein og hvør broyting í fólkaskúlalógini má byggja á eina greining av faktuellum viðurskiftum, hvørjir trupulleikar eru við verandi skipan og eina fakliga meting av, á hvønn hátt skúlin gerst betri við ætlaðu broytingunum, og síðani eini politiskari støðutakan til hesi viðurskifti. Í hesum sambandi skal upplýsast, at kommunurnar hava skyldu at skapa karmarnar fyri tí virksemi, sum fer fram í landsins fólkaskúlum. Kommunurnar taka hesa uppgávu í størsta álvara og brúka árliga væl omanfyri 100 mió. kr. til rakstur í fólkaskúlunum, eins og kommunurnar støðugt gera íløgur í skúlabygningar fyri aðrar 100 mió. árliga. Kommunurnar hava tí ein sjálvsagdan áhuga í viðurskiftunum kring fólkaskúlan og eiga tí eisini at vera natúrligur partur av tilgongdini at broyta skipan og rakstri av fólkaskúlanum.

Viðvíkjandi broytingum í sambandi við 10. flokk er at siga, at kommunurnar eru greiðar yvir, at tað er ein avbjóðing bæði at veita næmingunum breið (breyta-) tilboð, samstundis sum

**R. C. Effersøesgøta 26 · FO-100 Tórshavn**

**Tlf. +298 302480 · T-postur: kf@kf.fo · Heimasíða: www.kf.fo**

næmingatalið í 10. flokkunum er fallandi. Samstørvini millum skúlarnar sum er í dag, eru hinvegin dømi um, at skúlaleiðslurnar, saman við lokalum myndugleikunum, finna loysnir sum eru næmingunum og undirvísingini at frama.

Kommunufelagið hevur noterað sær fráboðanina í viðmerkingunum um, at tey samstørv, sum í dag eru, kunnu halda áfram (hóast fyribils bert í 3 ár.) Hinvegin skapar kravið um at minst 15 næmingar skulu verða innskrivaðir, áðrenn 10. floks samstarv verður skipað, at skúlar við færri enn 15 næmingum í 10 flokki, sum í dag luttaka í vælvirkandi skúlasamstarvi, ikki longu kunnu luttaka í hesum samstarvi, og harvið gerst 10. floks tilboðið verri. Sum ítøkiligt dømi um, hvat broytingin kemur at merkja fyri e-Nám samstarvið millum Fuglafjarðar skúla, Skúlan við Streymin og Stranda skúla, er hjálagt avrit av skrivi frá skúlastjóranum í Fuglafjarðar skúla, Ólavi Larsen, dagfest 21. januar 2019.

Til § 1 pkt. 6 er at viðmerkja, at undirtøka er fyri at lækka tímatalið, tó eru stór ivamál um, og hvussu hesir tímarnir fara at verða brúktir, og um skúlarnir veruliga fáa ræði á teimum ella teir fara í eina pulju. Kommunufelagið tekur ikki undir við at skerja undirvísingina í móðurmálinum, men í staðin taka nakrar tímar av øðrum málum ella av søgu. Somuleiðis verður víst á tørvin á fleiri tímum til vallærugreinar í hádeild, har tað í flestu førum er torført at bjóða tímar, vegna ov teprar tímajáttanir. Eisini verður víst á, at við færri tímum í grunddeild, verður størri tørvur á frítíðarskúla, umframt at skúlaárið ætlandi verður skert.

Í sambandi við uppskotið at lækka tímatalið, verður mælt til, at eyka frítíðin verður løgd sum vetrarferia.

Til § 1 pkt. 11 og 13 er at siga, at Kommunufelagið hevur einki at viðmerkja til, at landsstýrismaðurin í undirvísingarmálum góðkennir undirvísingarliga partin. Hinvegin er tað óneyðugt bureaukrati at umsitingarligi og fíggjarligi parturin skal góðkennast av øðrum landsstýrisfólki, møguliga bæði av Heilsu- og innlendismálaráðnum og Fíggjarmálaráðnum. Slíkar góðkenningar eru harnæst í stríð við prinsippið um, at kommunurnar hava ábyrgd av egnum avgerðum. Skúlamyndugleikin á staðnum (t.e. kommunustýrini og skúlastýrini) eigur at hava skyldu at veita eitt tilboð, hvørs innihald landsstýrismaðurin í undirvísingarmálum góðkennir, men í aðra mátar eru skúlamyndugleikin og serstakliga kommunustýrini, sum sjálvstøðugir myndugleik, fult før fyri at hava og taka ábyrgd av, hvussu hesi tilboð verða útførd í verki, bæði umsitingarliga og fíggjarliga. Kommunurnar eru sum heild undir landsstýrisins eftirliti, og tað er nøktandi í mun til tað, sum ætlanin er at broyta í § 31. Harnæst eru greið dømi um, at ógreitt ábyrgdarbýti ímillum fleiri myndugleikar og stovnar kann elva til, at ongin tekur ábyrgd, ella at mál ikki verða avgreidd orsaka av iva um ábyrgdarbýtið.

**R. C. Effersøesgøta 26 · FO-100 Tórshavn**

**Tlf. +298 302480 · T-postur: kf@kf.fo · Heimasíða: www.kf.fo**

Í viðmerkingunum til § § 1 nr. 13 verður sagt, at *"Um so er, at kommunurnar ikki kunnu semjast um eina skiftisskipan, tekur landsstýrismaðurin avgerð í málinum."* Kommunufelagið kann als ikki góðtaka, at tað verður heimilað landsstýrinum at taka avgerð í møguligum innanhýsis ósemju millum kommunurnar. Kommunurnar eru undir einum legalitetseftirliti, sum merkir, at landsstýrið hevur eftirlit við at tær avgerðir, sum kommunurnar taka, eru lógligar. At leggja ein avgerðarrætt, sum kommunurnar hava, til landsstýrið, er eitt brot við hetta prinsipp. Tað má bera til at skipa foreldraumboðanina í einum skiftisskipan øðrvísi enn at landsstýrið skal skera ígjøgnum, møguliga við at gera ein meira nágreiniligan hátt at velja umboð í eini tílíkari støðu, og at áseta at valið síðani kann roynast við t.d. einum kærumøguleika.

Til § 1 pkt. 14 er at viðmerkja, at hetta longu er galdandi í dag, og tí er broytingin óneyðug.

Umframt omanfyri nevndu viðmerkingar til broytingarnar í fólkaskúlalógini, fer Kommunufelagið at koma við niðanfyri standandi viðmerkingum um, hvørji onnur viðurskifti í fólkaskúlalógini áttu at verið broytt. Talan er um viðmerkingar, raðfestar eftir týdningi.

Til § 55: Ynskiligt er við eini broyting, so tað ber til, har tað er tørvur á tí, at stovnseta eina tvørfakliga toymisleiðslu fyri forskúla, skúla og frítíðarskúla, antin sum almenn heimild ella heimild til at innganga avtalu við kommunur um einstakar skúlar. Hetta inniber t.d. at ein námsfrøðingur kann vera partur av toymisleiðsluni fyri samlaðu organisatiónina og vil innibera ávísa mannagongd/samanseting viðvíkjandi fígging/rindan av løn til samansettu toymisleiðsluna. Hetta kundi verið gjørt við kunngerðarheimild, avtaluheimild ella við eini heimild til eina slíka royndarverkætlan.

§ 55, stk. 7: Her er ein heimild til reglugerð fyri fólkaskúlaleiðarar, men eingin reglugerð er. Ein reglugerð eigur at vera gjørd í 2019 í samráð við Kommunufelagið.

Til § 47, stk. 4: Í stk. 4 stendur: *"Kommunustýrið hevur ábyrgdina av rakstrinum av skúlunum í kommununi og ásetur fíggjarkarmin fyri tann einstaka skúlan."*Her er átrokandi neyðugt at fáa betri greiði á viðurskiftunum. T.d. kundi verið sett inn ein kunngerðarheimild, ið ásetti, at landsstýrismaðurin kann gera kunngerð, og at henda skal gerast í samráð við Kommunufelagið. Skipanin í dag elvir áhaldandi til (óneyðug) ivamál og gott hevði verið, at fingið hetta avgreitt soleiðis, at tað kemur í eina betri legu.

Til § § 14, stk. 5**:** Í greini er ásett, at *"Landsstýrismaðurin kunnger miðalúrslitið fyri landið í føroyskum, støddfrøði og náttúru og tøkni í 4. og 6. flokki og almannakunngerð samstundis frágreiðing um royndarúrslitið. Royndarúrslitini hjá einstaka næminginum, sbr. tó stk. 8, flokkinum ella skúlanum, eru í trúnaði. Starvsfólk skúlans o.o., sum taka ímóti ella viðgera úrslitini í landsroyndini, hava tagnarskyldu um hesar upplýsingar."* Mentamálaráðið kundi

umhugsað at fingið enskt við sum royndarfak, umframt at almenna frágreiðingin eisini innihelt frágreiðing um kynsmun, landafrøðiligar munir, umframt at veita fleiri upplýsingar enn miðalúrslitið, tí tað sigur ov lítið um úrslitið, t.d. upplýsa spjaðingina av úrslitunum. Harumframt hevði verið ynskiligt, at royndarúrslitini fyri einstakar flokkar kundu verið latin skúlastýrinum og kommunustýrinum í trúnaði at viðgera. Støðan í dag er als ikki nøktandi, at myndugleikar, ið umsita staðbundna kommunala skúlan, als ikki kenna slík úrslit (í trúnaði) og hava møguleika at fyrihalda seg til viðurskiftini.

Til § 54**:** Ásetingarnar í viðmerkingunum viðføra, at t.d. kommunala umsitingin ikki kann vera limur í setanarnevnd, meðan t.d. kommunustýrisumboð í skúlastýrinum er við í stjórasetanum og eru eisini meiri ella minni tvungin til at vera við í setanarbólkum í sambandi við lærarasetanir, og tekur tað nógva tíð í størri skúlum. Hevði verið ynskiligt við nakað meira fleksibliliteti. Greinin er fyri so vítt í lagi, men tulkingin av viðmerkingunum er ov bundin, og tí má okkurt henda. Tað er nú eydnast at fáa umboð fyri kommunuumsitingina við sum ráðgevi í sambandi setan av skúlastjórum - hetta er nøktandi loysn fyri fyrst.

Til § 63 (hongur saman við § 47, stk. 7): Greinin trongir til broytingar, tí flestu av nýggju skúlabygningunum er gjørdir til fleirnýtsluendamál, og er henda ásetingin ótíðarhóskandi og avmarkandi. Tá kommunur byggja nýggjar bygningar, eigur fokus at vera á at hava hóskandi karmar, og ikki hvat bygningurin annars verður brúktur til, so leingi skúlavirksemið hevur tað gott.

Til § 31 stk. 5: Tað verða ov nógv foreldraumboð í skúlastýrinum um hvørt undirvísingarstað velur tvey foreldraumboð. Tí eigur hetta at verða broytt til, at hvørt undirvísingarstað velur eitt umboð fyri foreldrini, sum kann venda sær til skúlastýrið við málum, og sum skúlastýrið kallar inn, tá mál, ið viðvíkja undirvísingarstaðnum eru á skrá.

--oOo--

Kommunufelagið væntar at verða tikið við uppá ráð í framhaldandi broytingunum í fólkaskúlalógini, og síggja vit fram til eitt samstarv og eru vit fús at koma við okkara íkasti til hetta arbeiði.

Vegna Kommunufelagið

Dennis Holm, formaður

Eyðun Christiansen, stjóri

R. C. Effersøesgøta 26 · FO-100 Tórshavn

Tlf. +298 302480 · T-postur: kf@kf.fo · Heimasíða: www.kf.fo